Dimmalætting

Stovnað 1878
*Ábyrgdarbladstjóri:* Beate L. Samuelsen
*Bladstjóri:* Georg L. Petersen
*Útgevari:* P/F Dimmalætting
*Prent:* Dimmalætting

AVGREIÐSLA: Manad. til hósd. kl. 8.00-17.00. Friggjad. kl. 8.00-16.00. Leygard. stongt. Tlf.-avgreiðsla kl. 8.00-16.00. Tlf. 311212. Fax: 310941. Smyrilsvegur 13, Postboks 19, FO-110 Tórshavn.
*e-mail:* redaktion@dimma.fo, prent@dimma.fo, lysing@dimma.fo, haldari@dimma.fo, bokhald@dimma.fo, kronikk@dimma.fo, vidskerin@dimma.fo

**INNLATINGARFREIST FYRI LÝSINGAR**

| | Týsdagsblaðið | Mikudagsblaðið | Hósdagsblaðið | Friggjadagsblaðið | Leyg.dagsblaðið |
|---|---|---|---|---|---|
| Størri lýsingar | frí. kl. 12 | mán. kl. 12 | týs. kl. 12 | mik. kl. 12 | hós. kl. 12 |
| 2 tg. tekstlýsingar | má. kl. 10 | týs. kl. 10 | mik. kl. 10 | hós. kl. 10 | frí. kl. 10 |
| Okkara Gulu | frí. kl. 15 | | týs. kl. 15 | | hós. kl. 15 |

Lýsingar, ið nógv arbeiði er av, mugu vera inni í góðari tíð.
Litlýsingar og lýsingar við framíhjáplássi skulu bíleggjast í góðari tíð.

**Vanligar treytir:** Síðustødd: 8 teigar á 41x515 mm. 1/1 síða 4.160 mm. Útsjónd: Lýsingar, sum eftir blaðsins meti kunnu mistakast fyri blaðtilfar, skulu merkjast við orðinum: Lýsing, sum verður roknað uppi lýsingarmátið. Orðið INSERAT verður ikki góðtikið. Innlatingarfreist fyri lýsingar: Sæst á skemanum til vinstru.

**Fyrivarni:** Innihaldið í lýsingunum má ikki stríða móti galdandi lógum. Ábyrgdina fyri hesum hevur lýsarin. Blaðið tekur sær rætt til at sýta at taka lýsingar við, sum blaðið metir óynsktar.

Teknisk viðurskifti og umhugsan fyri lesarum og lýsarum ger, at blaðið má tilskila sær rætt til at
1. gera smærri týdningarleysar broytingar í lýsingum hvat teksti og uppsetan viðvíkir.
2. skjóta út eina lýsing til seinni blað.

Litlýsingar kunnu bert takast við, um tekniskú viðurskiftini loyva tað.

Endurgjald fyri møguligar villur, sum lýsarin sjálvur ikki hevur skyldina fyri, er vanliga prísavsláttur eftir blaðsins meti um virðisminkan av lýsingini, men í mesta lagi at lýsingin, ella líknandi lýsing, verður tikin við aftur seinni ókeypis. Villur, sum standast av vánaligum lýsingartilfari hevur blaðið onga ábyrgd av.

Lýsingar, sum verða inntelefoneraðar, verða altíð lisnar uppaftur, og blaðið tekur tí onga ábyrgd fyri villur, sum koma á henda hátt.

# *Marknamálið ein liður í loysingini*

SUM heild fegnast tey flestu um marknaavtaluna, ið endiliga er fingin í lag millum Føroyar og Bretland, soleiðis, at ikki er neyðugt at bíða í enn fleiri ár, áðrenn treytirnar fyri fyrsta útbjóðingarumfarinum kann leggjast fyri okkara høga løgting, áðrenn vit trína inn um gáttina til næstu øld.

Hvussu vit so venda og snara málinum, er hetta eitt uttanríkismál, og hava tí bæði danski uttanríkisráðharrin og enski starvsbróðir hansara havt ein stóran leiklut í úrslitinum, sum nú fyriliggur hjá løgtinginum at taka støðu til.

Um vit við semjuni um marknamálið eru tikin við nøsini, kann bert úrslitið av eini framtíðar oljuvinnu í hesum somu økjum vísa. Tað ber illa til at siga nakað um tað nú, hóast ara langar marknasamráðingar eru farnar fram, áðrenn almannakunngjørda semjan var í hús.

Øll henda tíðin, tá tað fyri okkum onnur hevur tykist, sum marknatrætan viðhvørt var løgd til viks og nærum gloymd, hevur hon verið tikin framaftur, dustið blást av henni, og tá ringast hevur leikað á í føroyska samfelagnum, hevur málið sum ein hent gularót um Føroyar sum komandi oljuríkt land, verið luftað í nakrar vikur, fyri at vit aftur skuldu trúgva uppá framtíðina. So hevur málið sum vanligt verið tagt burtur og lagt upp á hillina aftur.

Marknatøgn skuldi til fyri at mýkja hin partin, Bretland, varð sagt frá føroyskari síðu. Gingu fjølmiðlarnir alt ov harðliga fram í hesum máli, oyðiløgdu teir, sum teir kúllar teir altíð eru í politiskum spæli, eitt komandi úrslit, sum føroyingar kundu verða nøgdir við!

At marknatrætan endiliga er komin uppá pláss er sjálvstýrislandsstýrið sera fegið um. Tað kann eingin siga tað ringt fyri, men høvdu vit bíðað eitt sindur aftrat, og tað skuldi einki verið til hindurs fyri tí, tí føroyingar eru eitt tolið fólkaslag, so høvdu vit fingið meiri burtur, heldur andstøðuflokkurin Sambandsflokkurin, ið eisini hevur sett síni fingramerki á málið. Tað tolsemi hevði sami andstøðuflokkur eisini sýnt, um hann var í samgongu, tí so høvdu Føroyar fingið størri part av marknakøkuni!.

Eitt slíkt mál hevur skund. Serliga í hesum sjálvstýristíðum.

Tað er politiskur fullveldistaktikkur at hava fingið ein enda á marknatrætuni, sum í fyrstu syftu tykist »superb«, men sum vit í aðru syftu ikki reiðiliga duga at handfara sjálvi og tí mugu hava hjálp uttanífrá frá teimum stóru oljufeløgunum, ið ikki øll hava tað so gott fíggjarliga, sum tey einaferð høvdu tað.

Fyri okkum er alt, sum luktar av olju, nakað, ið fær okkum at hugsa um Føroyar sum eitt komandi oljuævintýr, ið tíverri kann gera, at onkur verður vónsvikin. Eitt ævintýr er og verður einki annað enn eitt ævintýr!

Endin á marknatrætuni millum Bretland og Føroyar er byrjanin til nakað ókent, sum vit ikki hava ráð til sjálvi at útinna í verki og tí mugu binda okkum við hond og føt til oljurisarnar.

Sambært sjálvstýrisamgonguni er tað ein frægari framtíðarloysn enn at verða í ríkisfelagsskapinum við Danmark. Tí er politikkur landsstýrisins hann, at betur er at kvetta við danska kongaríki fyri síðani at múlabinda okkum til eitt oljufelag og harvið seta lunnar undir Føroyar sum ein suverenan stat.

Fyri landsstýrissamgonguna hevur tað skund, tí meirilutin av fólkinum er ímóti fullveldisætlanini.

# *Tillukku við barninum*

*Hvønn leygardag ynskir Dimmalætting foreldrum tillukku við lítla barninum, annaðhvørt bara í teksti ella í teksti og myndum. Hetta gera foreldrini sjálvi at. Send brævbjálvan til Dimmalætting, postboks 19, 110 Tórshavn merkt »Tillukku við barninum«, skriva avsendara, navn og adressu, so vit kunnu senda myndina aftur sum skjótast. Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd í blaðið. Vit skulu hava myndirnar í seinasta lagi friggjamorgun. Um foreldrini ynskja tað, kann myndafólk frá blaðnum taka myndina ókeypis. Ring 311212, og vit avtala nærri.*





## Orðið

*Les Sálm 119,97-112*

**ALT SUM TAÐ ER**

*Øll skriftin er innblást av Gudi og er nyttulig til lærdóm, til sannføring, til rættleiðing, til uppfostran í rættvísi.*
*– 2. Timoteusarbræv 3,16*

NØKUR ÁR herfyri høvdu nakrar familjur tað til vana at lesa ein ella tveir kapitlar í skriftini við náttur̈ðaborðið, so tær umsíðir komu gjøgnum alla Bíbliuna. Lósu úr Fyrstu Mósebók til Opinberingina uttan glopp. Sjálvt ættartalvurnar við knortlutu nøvnunum blivu lisnar hart.

Mugu kunna loyva okkum at spyrja, hvussu huggloypandi henda mannagongd mundi kennast hjá smábørnum, men tað gjørdi familjulimirnar kunnigar við alt Orð Guds. Tað vísti ungu barnasálini lívsins syndadýpdir og andans hæddir og lærdi tey rætt og rangt.

Um tú ongantíð hevur gjørt so, so legg meðni egna ætlan um at lesa alla Bíbliuna ígjøgnum annaðhvørt við familju ella sum andaktstímar í sjálvdrátti. Tað eru tvinnar týðandi grundir til at fara undir tílíka ætlan. Onnur er, at Paulus sigur alla skriftina vera innblásta av Gudi og nyttuliga (2. Timoteusarbr. 3,16). Hin er vitnisburður teirra trúgvandi, hvørja lív eru broytt av at fylgja sovorðnari mannagongd.

Les Orð Guds heilt ígjøgnum, og fyri tær letur seg upp ætlan Guds við frelsandi náði síni og tað, at tú sjálvur vart tann, Hann elskaði, longu áðrenn tú vart borin í heim.

Les hana eina ferð, so fer tær leingjast eftir at lesa hana uppaftur!

*Á, gævi hesi himnabløð*
*mær altíð royndust kós,*
*so nýggjar dýrdir eg fekk sjá*
*og størri Andans ljós.*

© –prp–

# Tøkkir

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara góða kona, mamma, vermamma, omma og langomma

***Jutta Poulsen***
Froðba

andaðist og varð jarðað.

Familjunnar vegna
*Martin, Marion, Elmar*
*Ketty, Meinhild og Morid*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, ið vístu samkenslu, tá okkara kæri

***Tormóður Dahl***

doyði og varð jarðaður. Tøkk Heri, prestur, sangarar úr Cantabile og øll tit, ið hjálptu okkum so væl til ta vøkru útberingina úr Sandagerði, og tøkk fyri peningagávur til Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag.

*Wenche og Elin*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá ið okkara kæra, elskaða mamma, systir, vermamma, omma og langomma

***Valborg Joensen***
(vanliga nevnd Bogga)
Tórshavn
ættað úr Saksun

andaðist og varð jarðað.
Hjartans tøkk til Heimarøktina og Landssjúkrahúsið, sum vóru um hana seinastu sváru tíðina.
Hjartans tøkk til Bjarna Bæk prest fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni, somuleiðis til organist, dekn, klokkara, gravara og sangarar.
Hjartans tøkk fyri blómur, kransar og til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Fyri tey avvarðandi
*Eyðbjørg, Magnus Pauli, Óluva, Katrin og Helgi*



Foreldur míni og eg takka øllum, sum gleddu meg á konfirmatiónsdegnum.

Blíðar heilsanir
*Elisabeth Finnbogadóttir Arge*

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum, sum mintust meg á føðingardegnum tann 24. apríl.

Blíðar heilsanir
*Bjarne*



Eg og foreldur míni takka øllum, sum við vitjan, gávum og telegrammum gleddu meg á fermingardegi mínum 28. mars 1999.

*Tummas Pauli Olsen*
*Húsavík*

# Yrkingar

## *Lat Jesus sleppa leiða*

***Lag: Breið tínar náðiveingir***

Lat Jesus sleppa leiða
teg eftir lívsins veg,
hann vil teg fegin eiga,
tí ofraði hann seg,
hann skálina drakk tóma
bert fyri bjarga tær,
nú kanst tú betur hóma,
hví tú so dýrur var.

Ja, sigurin er vunnin,
hann kostaði væl nógv,
og frelsuvegur funnin,
um tað er fullgott prógv,
úr grøv reis upp hin deyði,
hann er tað lívsins breyð,
vár misbrot á seg legði,
vit eru loyst úr neyð.

Hvør syndari er grøddur,
sum gávuni mót tók,
sostatt av nýggjum føddur,
tað sigur halga bók,
kom við og lat teg leiða
av hesi sterku hond
og orðið Guds útbreiða
um bygdir og um lond.

Ei betri gáva givin
av nakri' mannahond,
burt rikin allur ivin,
ei tyngja syndabond,
nú liva av Guds náði,
ei sjálvur gjalda skuld,
lov, tøkk og prís tú fái,
í Kristi er hon huld.

Vit biðja teg, á Harri,
hjálp okkum tæna tær
og koma til tín nærri,
sum syndir várar bar,
gev okkum um tað gáa,
at lívið er so stutt,
vár góði Gud oss náða,
tá hiðan verður flutt.

**Karl Højsted**




**Lesið tíðindi á Interneti**
**- dag sum nátt -**

Dimmalætting
*– góður lesnaður*
*– altíð við tí nýggjasta*
*– fer í næstan hvørt hús í Føroyum*

## Veitst tú, at

- Barna- og Ungdómstelefonin svarar hvønn mánadag kl. 16-18.
- Telefonin er 10645
- Foreldur eisini kunnu ringja og fáa ráðgeving.
- Tey, sum svara, hava tagnarskyldu.
- Tú kanst vera anonymur.

**Hvat kanst tú ringja um**

- Persónligar trupulleikar av øllum slag, t.d. incest, anorexia el. bulimi, alkohol, fyribyrging, royking ella bara hava brúk fyri at tosa við onkran vaksnan.

BARNARÁÐ FØROYAR

Smart
Hettutroyggja
**v/ stuttum ermum - std.: 8 - 16**





**Litir: grátt, hvítt, pink og ljósablátt**
**kr. 119,-**



**DADDAN**
**á Hálsi - tel 312138**